# Ongland kann koma langt

Fyrrverandi liðformaðurin á enska landsliðnum, Bryan Robson, sum nú er venjari hjá West Bromwich heldur, at Ongland kann koma langt í HM-endaspælinum í summar.

– Vit hava eina sterka verju, Steven Gerrard í stórformi, og so eru eisini nógv mál í Lampard og Crouch. Um vit ikki taka Brasil við, so er einki lið í kappingini, sum Ongland skal óttast, sigur Bryan Robson við teamtalk.com

Hann heldur, at verður Wayne Rooney ikki klárur til kappingina, verður tað Steven Gerrard, sum rættiliga fer at ganga undan á liðnum.



# Toddi snýttu fyri brotsspark

Start spældi í gjár á útivølli ímóti Sandefjord í norsku tippuliguni. Todi Jónsson spældi allan dystin í álopinum hjá Start, og hann var aftur hesaferð sera virkin og framsøkin. Sandefjord koma á odda, tá ið ein slakur tími var spældur, men eitt korter fyri tíð eydnaðist tað Start at javna. Málskjútti var Alex Valencia. Heimasíðan hjá Start vil verða við, at liðið var snýtt fyri sigurin, tí tveir minuttir fyri leiklok varð Todi Jónsson feldur í brotsteiginum hjá Sandefjord, uttan at dómarin lat við seg koma.

# Ætla sær allan vegin



Hóast Piotr Krakowski væl veit, at onnur og størri feløg als ikki hava hug at lata EB/Streym renna undan sær, so staðfestir hann, at teirra lið er væl brynja til langa kappingarárið, har tað enn resta 16 umførr.

– Tað er ikki støddin á felagnum, men av hópinum, sum er avgerandi. Hjá okkum er talan um eitt miðvíst arbeiði, sum higartil hevur tikið fýra ár. Vit hava støðugt arbeitt við at bygt hópin upp, og í dag telur besti hópurin einar 20 mans, sum allir kappast um pláss millum teir fyrstu 11. So tað er ikki heilt rætt, tá sagt verður, at EB/Streymur er ov lítið til at hanga við allan vegin, heldur hann.

Men hóast hetta, so viðgekk hann eisini, at tað var nakað tungt at standa á beinkinum seinna hálvleik á Eiði sunnudagin.

– B36 byrjar at spæla við longum bóltum, har teir fyrst gúppa og síðani royna at vinna næsta-bóltin. Tað ger tað sera trupult hjá okkum, tí vit detta ov langt aftur, og vit megna ov sjáldan at spæla okkum burtur.

– Tað bøtti tó um, tá eg skifti Fróða (Clementsen, bløm.) inn. Hann er somikið sterkur í høvdinum, og við at seta hann sum verjuspælara framman fyri miðverjuna, fingu vit nógv betri fatur á mongu bóltunum.

– Og so skal heldur ikki gloymast, at vit hóast alt skapa nakrar kontra-kjansir. Teir eru kanska ov fáir í tali, men har eru einir tveir, sum eiga at avgera dystin, helt Piotr Krakowski.

**-mørk**

# Undir alt lágmárk



B36-venjarin var alt annað enn blíður um avrikið, tá vit eftir dystin á Eiði fingu orðið á hann.

– Tað er ein skandala, at vit spæla fyrra hálvleik, soleiðis sum vit gera. Vit koma úr Klaksvík, har vit veruliga stríða okkum til ein sera týdningarmiklan sigur, og so kunnu spælararnir ikki vera bekentir at levera ein slíkan fyrra hálveik. Har er eingin frítikin – hatta var bara ikki nóg gott!

Men tit koma tó væl við eftir steðgin. Og tit kundu eisini havt javnað. Hvat broyttu tit?

– Vit fluttu bara bóltin fram. Tað er trupult at spæla fótbólt á hesum vøllinum, og tí valdu vit at spæla við longum bóltum. Samstundis fluttu vit Mikkjal niðan sum sentralan áleypara, og við styrki síni røkti hann hesa uppgávuna væl. Vit klára eisini at skapa okkum fleiri kjansir, og tað vildi væl ikki verið órættvíst, um onkur av hesum hevði givið úrslit í einum útjavnandi máli, helt Sigríður at enda.

**-mørk**

EB/Streymmur-B36 2-1 (2-0):

# Meistarar mugu eisini

*EB/Streymur*

*B36*

**Tað kostaði B36 dýrt, at liðið í ein hálvleik gloymdi fremsta eyðkennið frá gullárinum í fjør. EB/Streymur tykist hinvegin als ikki líta aftur um bak, og eftir 11 umfør eru teir framvegis ovastir á talvuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var mest sum lagt upp til stórdyst í Mølini á Eiði, tá meistararnir vitjaðu oddaliðið. EB/Streymur hevur snøgt sagt verið flúgvandi higartil í ár, men hóast góðu gongdina, so mundu áskoðararnir ikki kenna seg vísar í nøkrum sum helst. B36 var í fjør eitt av bara tveimum liðum, sum tók alt við sær av Eiði, og eftir viku gamla sigurin í Klaksvík tóktust meistararnir eisini veruliga at vera á beinari kós.

### Einvegis ferðsla

Var talan um beina kós, so varð henda tó so dyggiliga avrættað fyrstu trý kortini á Eiði. Byrjanin var kanska varislig frá báðum pørtum, men tað var tó skjótt, at vertirnir komu á rætta lagið.

Við útgangsstøði í eini verju, sum lá hampuliga djúpt á vøllinum, byrgdu teir í fyrstu atløgu fyri, at gestirnir skuldu gerast serliga vandamiklir. Tað bar eisini við sær, at toluliga langt gjørdist millum ketunar hjá báðum pørtum, og tað plássið, sum tá íkom, dugdu teir á heimaliðnum sera væl at nýta.

Fleiri ferðir megnaði EB/Streymur sera væl at spæla seg niðan eftir miðvøllinum til góðar møguleikar, og ikki minst gjørdist talan um vandastøður, tá spælt varð upp eftir kantunum, tó at Jákup Mikkelsen megnaði at hava tamarhald á flestu innleggunum.

### Heima-kassarnir

Tað tóktist tó bara vera ein spurningur um tíð, áðrenn hol kom á. Vertirnir hildu á við ágangandi spælinum, og hjá B36 høvdu teir ilt við at byrgja fyri hesum. Ikki minst tí Bárður Olsen og Ronnie Samuelsen høvdu sera gott tak á sentrala miðvølliknum. Og valdi B36 at spæla langt, fekk EB/Streyma verjan í allar flestu førum ruddað bóltin langt av vandaleið.

Um hálva tíman eydnaðist eisini at fáa mál. Bólturin varð fangaður í vinstru, og eftir skjótt 1-2 samanspæl við Hans Paula Samuelsen gjørdist Sorin Anghel púrasta leysur. Vandamikli rumenin helt leiðina inn í brotsteigin, og so var fagnaðurin stórur, tá hann sendi bóltin framvið Jákupi Mikkelsen.

Málið tóktist bara seta enn meira ferð á heimamenninar. B36 fekk at kalla ikki eitt beint til jørðina næsta korterið, og tað var so ruddiliga uppiborið, tá leiðslan varð útbygd stutt undan steðginum. Hesa ferð var Rafal Kwiecynzki upphavsmaðurin til málið, tá hann sera hegnisliga varð sendir avstað í høgru. Einsamallur móti málverjanum valdi hann tó tryggu loysnina, tá bólturin varð rullaður tvørtur um til Arnbjørn, og so stóð 2-0.



### Kick'n rush

At B36-venjarin mundi tosa við stórum bókstavum í hálvleikinum, er eingin ivi um. Í øllum førum var liðið sum hamskift, tá teir komu út til seinna hálvleik.

Vakurt gjørdist tað ongantíð, men við longum bóltum og støðugum trýsti eydnaðist tó at tiltvinga sær eina munandi yvirvág. Í nógvum førum gjørdist talan eisini um meira ella minni tilvildarligar møguleikar, og summir av hesum vóru eisini heilt stórir. Einar tríggjar ferðir sást bólturin soleiðis dansa inni í málteiginum, og einar tvær ferðir høvdu gestirnir hampuliga góða orsøk til at kenna seg eiga brotsspark.

Tað eydnaðist tó bert at fáa tað eina málið, tá Símun Hansen varð seinastur á einum longum bólti frá Jákupi Mikkelsen. Sandoyingurin smekkaði til, og tá bólturin bar við eitt verjubein á vegnum, var Rene Tórgarð fullkomuliga seldur, meðan bólturin í einum bleytum boga sveimaði í málhornið.

Heilt tilvitað var tað, at EB/Streymur royndi seg við kontra-spælið, men tað var neyvan heilt so tilvitað, at liðið fall somikið langt aftur á vøllin. Hetta gjørdi tað nærum vónleyst at spæla seg niðaneftir, og av tí sama gjørdist talan í longum løtum um øgiligt trýst.

## FAKTA UM DYSTIN

**EB/Streymur-B36 2-1 (2-0)**

1-0: Sorin Anghel, 28.
2-0: Arnbjørn Hansen, 40.
2-1: Símun Hansen, 60.